# HEILSANIR



Eg og foreldur míni takka hjartaliga øllum tykkum, sum gleddu meg á konfirmatiónsdegi mínum 1. apríl 2007.
**Heilsan Oda Maria Johannesen, Skáli**



**Góða Signhild**
Hjartaliga tillukku við 10 ára føðingardegnum.
**Ynskja omma og abbi**



**Góði Petur**
Vit ynskja tær hjartaliga tillukku við tí runda talinum, sum vit siga á flatlondum: "Det er ikke til at se det, hvis man ikke ved det". Vit vóna, tú fært ein góðan dag, gleða okkum til tú kemur heim.
**Kærastu heilsur ynskja foreldur og systur við familju**


Sosialurin **Heilsanir** kr. 30,-

**Gevið gætur**

Bert heilsanir, skrivaðar á henda lepan og goldnar frammanundan við kr. 30,- fáa innivist í blaðnum. Til ber eisini at lata okkum lepan og gjald í avgreiðsluni á Tórsgøtu 1, millum kl. 8.00 og 16.00

**Myndaheilsanir skulu vera okkum í hendi á miðdegi 1 dag fyri útkomudag.** Viðmerkið annars niðanfyri, um heilsanin ynskist í blaðið ávísan dag.

☐ Mán. ☐ Týs. ☐ Mik. ☐ Hós. ☐ Frí.

Tekstur: ______________________________________

**Myndina aftur:** Minnist til at skriva navn og bústað aftanfyri á myndina og leggja við ein frankeraðan brævbjálva við navni og bústaði. Um neyðugt fyri arbeiðsgongdina, taka vit okkum rætt til at fáa heilsanina í blaðið annan dag, enn tann ynskta.

Sent hevur (skal fyllast út).

Navn: ______________________

Bústaður: ______________________

Bygd/býur: ______________ Tlf.: __________

Sendið lepan, v/mynd og gjald til:
Sosialurin Postsmoga 76 · 110 Tórshavn
Merkið brævbjálvan: >>Heilsanir<<


# TILTØK


SAMBAND
SIGRID TRÓNDARSON
SIGRID@SOSIALURIN.FO
TLF 341800


**Gudstænastur**
**Hóskvøldið 27. sept.**
***Norðoya Vistarheim:*** kl. 19.30, Magnus Brahé Jørgensen

**17. sunnudag e. trin.**
***Havnar kirkja:*** kl. 11 Bjarni Bæk, ***prestainnseting, Kristine Stricker Hestbech verður innsett.***
***Talvan gongur fyri KFUM skótarnar í Føroyum***
***Vesturkirkjan:*** kl. 11.00 Hanus Simonsen, altarg. ***Talvan gongur fyri sunnudagsskúlan hjá Heimamissiónini***
***Vestmanna:*** kl. 11, Marjun Bæk. ***Í Kvívíkar kirkju gongur talvan fyri landaarbeiðið hjá Sunnudagsskúlunum hjá Heimamissiónini.***
***Í Kollafjarðar kirkju gongur talvan fyri Neyðhjálp Fólkakirkjunnar***
***Sørvágur:*** kl. 11 David Johannesen. ***Talvan gongur í Vága prestagjaldi fyri sunnudagsskúlan hjá Heimamissiónini.***
***Eiði:*** kl. 12 messa Emil Olsen
***Sjóvar kirkja:*** kl. 12, altarg., Jógvan Fríðriksson.
***Fríðrikskirkjan:*** kl. 11, konfirmatión, Martin R. Jacobsen
***Selatrað:*** kl. 17 Jógvan Fríðriksson.
***Fuglafjørður:*** kl. 11, altarg., Uni Næs. ***Í Fuglafjarðar prestagjaldi gongur talvan fyri sunnudagsskúlan hjá Heimamissiónini***
***Christianskirkjan:*** kl. 11, Magnus Brahé Jørgensen
***Húsar:*** kl. 11, altarg., Niels Pauli Danielsen
***Klaksvíkar sjúkrahús:*** kl. 10,
***Norðoya Røktarheim:*** kl. 14.30, Elsa Funding.
***Talvan gongur í Norðoya vestara prestagjaldi fyri sunnudagsskúlan hjá heimamissiónini***
***Hvannasund:*** kl. 12, Elsa Funding
***Vágur:*** kl. 14, Barna- og familjugudstænasta, Patrick de Neergaard
***Øravík:*** kl. 11 Símun Jacobsen. ***Talvan gongur fyri sunnudagsskúlan hjá heimamissiónini***
***Hvalba:*** kl. 12.30 Símun Jacobsen. ***Talvan gongur fyri sunnudagsskúlan hjá heimamissiónini***
***Sumba:*** kl. 11, Patrick de Neergaard

**Lívdin í Hoyvíkar skúla**
Fríggjakvøldið kl. 21 verður ungdómsmøti.
Sunnumorgunin kl. 10.30 familjumøti.
kl. 11.30 Samfelagsløta
kl. 12 Tilbiðjunarmøti har talar Jógvan Z.
Barnaansing undir bá›um møtinum.
Kl. 12 er Sunnudagsskúlin
Týskvøldið kl. 20 Bønarmøti
www.livdin.fo

**Frá Kirkju- og missiónshúsinum á Argjum**
Hóskvøldið 27. september kl. 20 Bíbliutími við Andrass Arge, Argir, ( 2. Kor. 6)
Fríggjakvøldið kl. 20 Ungdómsmøti.
Sunnudagin kl. 11 Sunnudagsskúli. (Liggur í gudstænastutíð.)
Sunnudagin kl. 18 Møti við Ukreinatoyminum.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Ebenezer**
Týsdag kl. 18.55 Sangvenjing – Gospel Hearts,
kl. 20 Sangvenjing - Ebenezerkórið.
Mikudag kl. 20 Bønar- og uppbyggingarmøti - Talari: Robert McLucky.
Hósdag kl. 20 Ungdómsmøti - Talari: Øssur Andreasen.
Sunnudag
kl. 11 Minnismáltíð Harrans
kl. 12 Sunnudagsskúli
kl. 18 Evangeliskt møti
Mánadag
kl. 12.30 Andakt
kl. 20 Konsert við Larry Ford, Ebenezerkórinum og Dupultkvartettini.
Heimasíðan: www.ebenezer.fo

**Frá Meinigheitshúsinum í Havn**
Týskvøldið kl. 20 Bíbliutími v. Reimund Langgaard, 2. Timoteusarbræv.
Hóskvøldið kl. 20 Ungdómsmøti v. Jens Suna Hansen.
Leygardagin kl. 9.30 Foreldur og børn.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti v. Jónhildu og Gullak Hansen, evni: Bøn og fasta.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Missiónshúsið v/ Landavegin**
Hóskvøldið kl. 20 Møti.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli á Norðasta Horni, kl. 18 Møti v/ Johan Henriksen.

**Evangeliihúsið, Tróndargøta.**
Mikudagin kl. 17.15 venur barnakórið.
Hósdagin kl. 16 eldrahugni.
Fríggjakvøldið kl. 21 ungdómsmøti.
Sunnudagin kl. 10.45 felags sjónvarpsmøti í Filadelfia, kl 18 møti við vitnisburðum.
http://www.gospel.fo

**Hebron á Argjum**
Mikudagin 26. september kl. 20.00: Bíbliutími og bønarløta.
Leygardagin kl. 14.00: Temadagur - fyri ungdómin.
Kl. 21.00: Opin Café.
Sunnudagin kl. 10.30: Morgunmøti og samstundis barnaansing.
Kl. 11.30: Samvera við drekka.
Kl. 12.00: Sunnudagsskúli og møti.: Manuel Delgado og ungdómurin luttekur.
Sunnudagsskúlin er hvønn sunnudag kl. 12.00.
Øll børn eru hjartaliga vælkomin.
Hjartaliga vælkomin í Hebron!

**Frelsunarherurin, Tórshavn**
Mikudag kl. 15.00 Bønarløta í salinum.
Hósdag kl. 20.00 Heimaforbund fyri allar kvinnur.
Sunnudag kl. 11.00 Halgunarfundur, Palli Petesen talar.
Eingin sunnudagsskúli, men Kl. 17.00 verður fundur fyri stór og smá. FAMILJUTÍMI við drekkamunni.
Sápa, suppa og frelsa síðan 1865.
www.frelsunarherurin.fo

**KFUM og KFUK í Havn**
Týsdagin kl. 17 í KFUK: Várgleði fyribørn.
Mikudagin kl. 19 í KFUM: Ten-sing kósið venur.
Hósdagin í KFUK: Seinnapartsamkoman við Elin Johannesen.

**Filadelfia, Landavegur 22**
Mikudagin kl. 17 bøn fyri Ísrael og Býnum.
kl. 18-19.45 Delli (3. til 6. fl.)
kl. 20-22 Chill (7. til 10. fl.)
Leygarkvøldið kl. 21 Flare.
Sunnudagin kl. 10.45 Sjónvarpsmøti v/ Tummas Jacobsen.
Mánakvøldið kl. 20 Bønarskúlin.
www.filadelfia.fo

**Tórshavnar hvítusunnusamkoma**
*Yviri við Strond*
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti, kl. 18 Evangeliskt møti.
Øll eru vælkomin.

**Filadelfia, Miðvágur**
Mikukvøldið kl. 20 bønarmøti.
Hóskvøldið kl. 20 ungdómsmøti.
Leygardagin kl. 16 bønarmøti.
Sunnudagin kl. 11 familju- og morgunmøti við sunnudagsskúla, Dánial á Dul Jacobsen talar.

**Aglow-Vágar**
Møti verður í Sørvágs Húsmøðrafelag hóskvøldið 27. sept. kl. 20. Talari er Mariann Jacobsen, Havn.
Allar kvinnur er vælkomnar.

**KEDRON í Sørvági**
***Mikudagin 26.09.2007.***
Húsbólkarnir møtast hjá teimum ymisku, onki Bønarmøtið verður í Kedron.

**Saron, Flatnavegur 7, Vestmanna**
Týsdagin 25/9, bønarmøti hjá Oddmar Hansen, á Ryggi, klokkan 20.
Mikudagin ungdómsmøti í Saron klokkan 20.
Sunnudagin evangeliskt møti við vitjan úr Skopun klokkan 18. Nátturði aftaná møti.
Verið vælkomin.

**Kollafjarðar Missiónshús**
Bíbiltími verður týskvøldið kl. 20. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Missións- og Ungdómshúsið á Glyvrum**
Mikudagin kl. 20 Bíbiltími v/Martin Restorff Jacobsen
Evnið: Trúarlæra.
Øll eru hjartaliga væl komin.

**Saron Haldórsvík**
Mánadagin 1/10 húsmøti hjá Henny Vík, klokkan 20
evni: Heilagi Andin.
Ver hjartaliga vælkomin.

**Frá Missiónshúsinum Tabor á Toftum**
Ytrimissiónsbarnaringurin byrjar aftur í missiónshúsinum á Toftum, mikudagin 26. sept. kl. 17.30 til kl. 19.
Øll børn 5 ár til og við 7 fl. eru vælkomin.

*framhald á síðu 39*